# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Val sum væntað

Tað hevur leingi prutlað undir lokinum í samgonguni og skrædlið í gjárkvøldið kann ikki vera komið óvæntað á nakran. Síðan persónskiftið í Sambandsflokkinum hevur ein partur av hesum flokki miðvíst stýrt móti einum broti við hinar samgonguflokkarnar. Tað kunnu vera nógvar orsøkir eitt nú persónligt agg og persónlig politisk vónbrot hjá ávísum sambandsmonnum – altso eitt slag av takk fyri seinast til løgmann og til fólkaflokkin frá "tjóðveldisvonginum" í sambandsflokkinum..

Hinvegin er eingin orsøk at ivast um tey reint politisku motivini hjá Sambandsflokkinum ella við øðrum orðum: flokkurin kundi ikki liva við teimum sera útreiðslukrevjandi málum, sum eru samtykt ella sum eftir øllum at døma fóru at verða samtykt á tingi. Afturat hesum kemur so tann ábyrgdarleysi yvirbjóðingarpolitikkur, sum hevur eyðkent ávísar samgongutingmenn seinasta hálva árið. Hetta hevur ivaleyst argað og ørkymlað sambandsfólk, sum gjarna vilja síggjast sum tey fíggjarliga og búskaparliga ábyrgdarfullu í føroyskum politikki.

Sjálvt um ein kann skilja "tjóðveldisvongin" í sambandsflokkinum, so skerst ikki burt, at slitið merkir eitt stórt vónbrot fyri ikki bert teir landsstýrismenn, hvørs stórmál liggja á tingborði, men eisini fyri fjøld av fólki, sum hava sæð fram til nakrar týdningarmiklar og harðliga tiltrongdar ábøtur á almannaøkinum, útbúgvingarøkinum og vinnuøkinum. Royndir frá øðrum valum í ótíð vísa, at tað fara at ganga eitt til tvey ár, áðrenn hesi mál verða avgreidd, um tey yvirhøvur verða avgreidd. Tað kann jú hugsast, at ein heilt onnur samgonga kemur til og blakar øll hesi mál í pappírskurvina.

Stóri spurningurin er, um postalínið eftir valið kann klinkast aftur ella skaðin er so stórur og sárini so djúp, at her vendist ikki aftur. Tað er ilt at spáa um, men tað tykist sum løgmaður og formenninir í ávikavist Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum hava hug at halda fram, um valið gevur teimum møguleikan. Teir høvdu í hvussu so er ein forsónligan tóna í sínum viðmerkingum. Hinvegin er tað almenn vitan, at teir kanska ikki hava baklandið við. Tað er í hvussu so er meira enn ivasamt, um allur Sambandsflokkurin stendur aftan fyri formannin. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## Okkara ungdómar eru ikki sibbar

MALLA DAM
Tvøroyri

Hvat billa tit tykkum inn!! Nógv kann ein siga um føroyingar, men eg trúgvi neyvan, at nakað land í heiminum eigur so fittan og eygagóðan ungdóm sum vit- so kanst tú PISA hvat tú vilt!!

At tey so ikki klára seg so frammaliga sum øll hini OECD londini í einari kanning, har nógvir næmingar fáa pening fyri at luttaka, er onki undarligt í.

Eg fari ikki at samanbera við ein urtagarð, men tað er líkavið. Tað er eyðvitað, at eingin blóma kann vaksa uttan vatn, summar skulu hava nógv vatn aðrar eitt sindur minni, ímeðan nakrar skulu hava heilt lítið. Tær blómur, ið verða ansaðar best, gerast eisini tær vakrastu. Soleiðis er tað eisini við okkara ungdómi – alt kemur ikki av sær sjálvum, karmarnar MUGU vera har, fyri at skapa menning.

Hetta hava vit vita leingi, men tað er nógv fyri, at ein útlendsk kanning av okkara børnum, skal til fyri at politikkarar rópa varskó.

Nógv undra seg yvir, at so fáir lærarar eru frammi og klaga sína neyð.

Tað má vera tí hugburðurin er, at einki hjálpir. Og teir sum klaga, enda við at gerast politikkarar og hava illa nokk traðkað fótin innum tingsins gátt, áðrenn teir hava gloymt nærum alt um kor fólkaskúlans.

Blívur tú við at blæsa luft í eina ballón, so brestur hon sjálvsagt til síðst- ja lærararnir eru um at bresta (nógvir eru brostnir), tí arbeiðsuppgávurnar bara vaksa og karmarnir fylgja slettis ikki við.

So ein innilig áheitan, til tykkum sum verða vald á ting í januar, frá mær sum lærari:

Gevi fólkaskúlanum tí hægstu raðfestingina av øllum málum!! Syrgið fyri at lærarar fáa teir bestu karmarnir at arbeiða undir- m.a. góða eftirútbúgving, góða løn og syrgið m.a. fyri, at næmingarnir fáa bestu hølisviðurskiftini at mennast í - ikki lata næst- ella triðbest vera best.

Vit eru so fá; vit eiga, mugu og skulu megna hetta stig. Okkara ungdómur hevur uppiborið betri enn at verða kallaður fyri sibbar!

Gera tit tað, so kemur tað av sær sjálvum at geva eina góða ringrás.

Glaðir og kveikjandi lærarar skapa ofta glaðar og dugnaligar næmingar sum so aftur skapa glað og vælnøgd foreldur. Voila!

PS Eg kann ikki lata vera við at nýta høvið, at heita á tykkum mammur, ommur, langommur, døtrar, systrar, svigarmammur og svigarinnur, ið varða av okkara skúla, um at velja eina kvinnu á ting. Tær raðfesta øðrvísi enn 96% av mannfólkinum, soleiðis er tað nú einaferð og soleiðis fer tað nokk altíð at vera!

## Føroysk skúlabørn nýta tíbetur ov lítið KT í skúlanum

CHRISTIAN VINCENTZ DALSGAARD
KT-ráðgevi
intra@intra.fo



Í kjalarvørrinnum av PISA kanningini verður gjørt vart við at okkara nýtsla av KT er minni enn í Danmark. Einfalt, okkara børn sita ikki nógv framman fyri telduni í skúlanum!

Tað frøir meg, og haldi eg, at vit skulu halda fast í hesum!

Eg vóni, at vit halda fast í eini leið ímóti altjógagerðini og skapa okkara egnu virðir.

Vegurin frá "filetfabrik til idefabrik" er ikki at eksponera okkara børnum fyri meira KT, men har aftur ímóti at stimbra tey við hugskotsmennandi uppgávum og nýta okkara umhvørvi nógv meiri í undirvísingini.

Góðu tingmenn og kvinnur. Eftir mínum tykki skulu tit gera eina skilagóða íløgu í tað, sum er í millum oyrini og ikki so nógv í tað, sum er ímillum oyggjarnar!

Nýtið eina milliard upp á undirvísing og royn at traðka nýggjar leiðir, tí tann, ið bert traðkar í fótasporum annan mans kemur aldri fram um hin. Eru vit nøgd við at verða aftast ella vilja vit verða fremst?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.